# Bygnaðurin møguliga broytast

*Starvsmannafelagið hevur aðalfund leygardagin. Gunnleivur Dalsgarð er undan aðalfundinum einastur í uppskoti til formann. Eisini eru bygnaðarbroytingar í felagnum á skránni*

DAGFINN OLSEN

Leygardagin hittast limir Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba til 39. aðalfund felagsins. Fleiri týðandi mál eru á skránni og sum formaðurin Gunnleivur Dalsgarð tekur til í formansfrágreiðingini, sum stendur í Starvsblaðnum, so hevur árið, vit nú hava lagt aftur um bak, uttan iva verið eitt av strævnastu og hendingarríkastu árum í søgu felagsins.

Nakrir av nevndarlimunum standa fyri vali. Ingun í Skrivarastovu, Heini Joensen og formaðurin Gunnleivur Dalsgarð. Eingin annar er undan aðalfundinum í uppskoti sum formaður.

Sjálvur metir hann, at orsøkirnar kunnu vera tvær. At fólk eru væl nøgd við formannin, ella at eingin vil taka uppgávuna uppá seg.

Men Gunnleivur Dalsgarð hevur ikki hug at rýma úr formanssessinum, hóast tað ofta tekur nógva tí og tey næstu mugu venja seg við, at »um eina løtu« kann merkja tveir ella tríggir tímar.

**Broytingar**

Eitt av stóru málunum á aðalfundinum eru broytingar í bygnaðinum av Starvsmannafelagnum og lógarbroytingar í tí sambandi.

Álitisfólk hava kunnað limirnar um ætlaðar broytingar.

Í formansfrágreiðingini sigur Gunnleivur Dalsgarð um broytingarnar, at nevndin er samd um, at fyrst og fremst skal byggjast á álitisfólkaskipanina, so hesi fáa sáttmálavunnar umstøður at arbeiða undir, bæði í tíð og løn, sum felagið samráddi seg til í sáttmálanum við Føroya Tele.

Nevndin leggur á aðalfundinum fram, hugsanir og møgulig uppskot um, hvussu hon hugsar sær broyttan felagsbyggnað.

Annars er formansfrágreiðingin drúgv og nakrar av yvirskriftunum eru Ríkisrættarliga støðan - fullveldi ella ikki, Sáttmálasamráðingarnar, Gerðarrættardómur, Álop á fakfelagsrættindi, Almennur starvsfólkapolitikkur, Almenni eftirlønarspurningurin. Undir yvirskriftini Bygnaðarbroytingar verður m.a. sagt soleiðis:

Vit hava áður nevnt, at tær stóru og umfatandi broytingarnar, sum gjørdar eru í almennu fyrisitingini seinastu árini, langt frá altíð hava havt hepnar avleiðingar við sær, tá talan er um okkara øki og samskifti við stovnar – heldur tvørturímóti.

Øll aðalstýrini virka mest sum sjálvstøðug landsstýri, uttan at nøkur beinleiðis sambinding er millum hesi, og tá okkara »adressa« bert er Fíggjarmálastýrið – lønardeildin – sum er sáttmálapartur okkara, er tað mangan tungt og torført at viðgera mál hjá limunum, sum liggja undir øðrum stýrum, har vit ikki hava stórvegis møguleika at koma inn. Her má eini liðiligari skipan finnast og ein samskipan gerast, soleiðis at ein altíð veit, hvar eitt mál er endað.

•••••••••••••••

Sett verða leiðandi fólk, ofta ung og beinleiðis av skúlabonki, uttan iva við góðum fakligum førleika, men stutt sagt við ongari leiðsluroynd og uttan yvirhøvur at hava sett seg inn í sáttmálaásetingar og starvsfólkaviðurskifti sum heild. Og tá koma skjótt hesi vælkendu harraboðini um at »vit hava leiðslurættin« inn í myndina og mál, sum annars kundu havt fingið eina skjóta og skilagóða loysn, enda sum stríðsmál, sum so aftur verða tung og torfør at loysa. Leiðslurættin hava vit ongar ætlanir um at taka frá teimum, men at hava leiðslurættin merkir eisini at tú fylgir teimum ásetingum, sum galdandi eru. So einfalt er tað.

Tað er tí eitt krav frá okkum, at áðrenn fólk vera sett í leiðandi størv, skulu hesi hava ella fáa hollan kunnleika til øll sáttmála- og starvsfólkaviðurskifti.

**Broyta lóg**

Annað áhugavert í Starvsblaðnum er m.a., at Ingun í Skrivarastovu umrøður arbeiðsmarknaðardagin tann 28. januar og staðfestir, at langt var millum partarnar.

Í greini stendur, at John Rajani, sum hevur royndir sum semingmaður, mælir til at broyta semingslógina frá 1928, so hon eisini umfatar almenna arbeiðsmarknaðin. Eisini heldur hann, at vórðu reglurnar fyri uratkvøður broyttar, so er betri fyri limirnar og demokratiið í feløgunum, um møguleiki var fyri at atkvøða beinleiðis um úrslitið, sum nevndarlimir høvdu samráðst seg til.

Eisini nevndi John Rajani, at í Danmark er semingslógin broytt, so fleiri semingsuppskot kunnu bindast saman, so fleiri fakfeløg innan sama øki kunnu atkvøða um felags semingsuppskot.


StarvsBLAÐIÐ

Blað hjá Starvsmannafelagnum nr. 1 • 2000

Aðalfundurin eigur avgerðina:

Bygnaðurin broytast

síða 3 og formansfrágreiðingin

Langt millum partarnar síða 4

Løgtingslóg ger mismun millum kvinnu og mann síða 8

Hvussu fæst frægast burturúr pensiónsviðbót síða 12

## Ársins álitisfólk

Fyri jól legði nevndin í Starvsmannafelagnum fram uppskot fyri álitisfólkini um at fara undir nýggjan tátt - at velja ársins álitisfólk.

Endamálið við tiltakinum er at heiðra álitisfólk, sum hava gjørt eitt serstakliga gott álitisfólkaarbeiði. Viðkomandi fær heiðursgávu, ið er gjørd til endamálið.

Á aðalfundinum fellur avgerðin.

# Enn ikki funnið semingsmenn

*Arbeiðstíðin skilir partarnar*

DAGFINN OLSEN

Hóast samráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið eru slitnaðar, so tykjast partarnir samdir um, hvar trupulleikin er.

Føroya Lærarafelag hevur sent út tíðindaskriv og eisini kunnandi blað í hvørt hús. Greitt er, at arbeiðstíðin skilir partarnar.

Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum sigur soleiðis um støðuna á heimasíðuni.

Tað, sum skilir partarnar, er serliga arbeiðstíðin hjá lærarum.

Lærarafelagið hevur kravt, at tann einstaki lærarin skal undirvísa í styttri tíð, men meiri tíð skal vera til fyrireiking o.a. Lærarafelagið grundgevur hetta við øktum arbeiðsuppgávum sambært nýggju fólkaskúlalógini.

Fíggjarmálastýrið hevur sagt seg vera til reiðar at tosa um arbeiðstíðina, men gongur ikki við til, at undirvísingartíðin verður stytt. Hinvegin verður ikki avvíst at seta loft á tíðina, sum verður brúkt til annað virksemi enn undirvísing. Tað krevur kortini, at arbeiðstíðin verður gjørd upp á annan hátt.

**Ikki funnið semingsmenn**

Lærarafelagið skuldi í gár venda sær til Fíggjarmálastýrið um val av semingsmonnum. Tíðliga seinnapartin í gjár hevði lønardeildin einki frætt viðvíkjandi semingsmonnum frá Føroya Lærarafelag.

# Eingin ferðapeningur eftir til brekað

*Skavispælið hjá Muskelsvindfonden hevur gingið so illa í Føroyum, at tað væntandi verður niðurlagt. Ein avleiðing er, at brekað ikki longur kunnu søkja um eitt ókeypis uppihald í Danmark*

DAGFINN OLSEN

Tvey tey seinastu árini hevur verið gjørligt hjá brekaðum og familjum teirra at søkja um stuðul til ókeypis frítíðaruppihald á Musholm Bugt Feriecenter í Danmark.

Visitatiónsnevndin hevur boðað MBF frá, at meira peningur er ikki játtaður frá Muskelsvindfonden til endamálið í ár 2000, tí skavispælið hjá Muskelsvindfonden í 1999 hevur klárað seg sera vánaliga fíggjarliga.

Væntandi verður spælið í 2000 niðurlagt í Føroyum og tí kann ikki roknast við, at peningur framyvir verður játtaður, so brekað kunnu fáa ókeypis uppihald á Musholm Bugt Feriecenter.

Summi av teimum, sum fingu játtan í fjør, nýttu ikki peningin, og tí er nakað av peningi eftir frá 1999. Avgjørt er at játta peningin til teirra, sum søktu í fjør, men fingu avslag.

Visitatiónsnevndin harmast um, at peningur ikki longur verður játtaður til hetta vælgerandi endamál.


*Tilvildarlig mynd*






*Her sæst so tann nýggi vegurin. Ein gonguteigur, sum blind eisini kunnu brúka, skal gerast niðri við vegin niðan til Egholmdstrøð. Ein onnur gongubreyt skal gerast oman fyri tað nýggju rundkoyringina, og ein triðja uppi við Húsagøtu, við bankan. Ein oyggj skal gerast mitt eftir vegnum, so at tað ongastaðni verður meiri enn eitt spor hvønn vegin at koyra eftir. Í oynna skulu plantur setast, so at fólk ikki fær gingið yvirum vegin, har ongir gonguteigar eru. Og at enda skulu bæði gongu- og súkkluteigur gerast*

# Bøta nú um trygdina í eini deyðsfellu í Havn

*Vegastrekkið uttanfyri SMS verður nú broytt fyri at bøta um ferðslutrygdina. Arbeiðið verður liðugt longu 1. juni og tað fer at kosta umleið tvær milliónir*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú skulu stórar ábøtur gerast á tað vegastrekkið í havn, sum mest ferðsla er eftir.

Men umframt, at nógvir bilar koyra eftir vegnum, er tað samstundis tað økið í Havnini, har einafest fólk er til gongu.

Talan er um vegastrekkið í R.C. Effersøesgøtu, uttanfyri SMS, sum mangna er nevnt ein tann størsta deyðsfellan í ferðsluni í Havnini.

Á hesum lítla vegastrekkinum eru fleiri óhapp hend tey seinastu árini og har hava eisini fólk latið lív.

Og eftir ta seinastu vanlukkuna 15. desember í fjør, tá ið ein óvitagenta læt lív, lovaðu Leivur Hansen, býráðsformaður, at nú skuldi farast undir arbeiðið at bøta um hetta vegastrekkið fyri at gera tað tryggari so at tað vónandi slapst undan fleiri sorgarleikum.

Hann lovaði eisini, at Býráðið fór at gera skjótt av.

Síðani hoyrdist onki aftur, og nú eru fólk so smátt farin at trákkast eftir at nakað skuldi fara at henda.

Men Býráðið kann ikki skuldsetast fyri at leggjast á boðini, tí í farnu viku byrjaði arbeiðið at gera hesar ábøturnar.

Leivur Hansen sigur, at arbeiðið umfatar alt vegastrekkið heilt frá Húsagøtu við gonguteigin yvirum vegin uppi við bankan, líka oman til gonguteigin yvirum vegin, nakað niðanfyri apotekið, har vegurin gongur niðan til Egholmstrøð.

**Verður liðugt 1. juni**

Arbeiðið skal vera liðugt longu 1. juni og tað fer at kosta góðar tvær milliónir.

Býráðsformaðurin sigur, at arbeiðið er rættiliga umfatandi.

Og millum annað fer tað at føra við sær, at tað verður neyðugt at steingja vegin í tvær vikur í vár.

Tað verður tær báðar síðstu vikurnar í mai mánaða.

Eitt nú skal ein rundkoyring gerast við høvuðsinnkoyringina til SMS og apotekið.

Men harafturat skulu ymsar ábøtur og ferðsluforðingar gerast á øllum vegastrekkinum frá Húsagøtu uppi við bankan, oman til gonguteigin við vegin niðan til Egholmstrøð, niðanfyri Apotekið.

Við vegin niðan til Egholmstrøð skal ein góður, tryggur gonguteigur gerast, sum eisini tey blindu kunnu brúka,

Beint omanfyri rundkoyringina við SMS verður eisini ein gonguteigur, umframt at ein triði verður uppi við bankan.

Hesar ábøtur fara at føra við sær, at tað fer ikki at bera til at koyra so skjótt eftir vegnum. Men hinvegin verður ferðslan nógv tryggari.

Somuleiðis skulu ábøtur eisini gerast á gongubreytirnar.

Marius Muller, tekniskur stjóri hjá býráðnum, sigur, at ætlanin er at gera eina rættiliga breiða oyggj mitt eftir vegnum, so at tað ongastaðni verður meiri enn eitt spor hvønn vegin at koyra eftir.

Í Oynni, mitt eftir vegnum, skal ymiskt plantast og tað skuldi tryggjað, at fólk ikki fara yvir um vegin, har gonguteigarnir ikki eru.

Somuleiðis er ætlanin at gera eina góða gongubreyt, umframt at súklubreyt skal gerast framvið vegnum.

Ætlanin er so seinni, at hendan súkklubreytin kann gjøgnumførast niðan á Ítróttarøkið.

Kommunan sjálv stendur fyri arbeiðnum, men hon samstarvar við privat byggifeløg um partar av arbeiðnum.

Annars hevur Verkfrøðingastovan gjørt projektið í samráð við Býráðið.

Marius Muller sigur, at samstundis, sum endamálið er at bøta um sjálva ferðslutrygdina, hevur býráðið lagt stóran dent á at gera økið so vakurt sum tilber.




*Hetta vegastrekkið í R.C. Effersøesgøtu uttanfyri SMS í Havn hevur kravt fleiri mannalív, men nú skulu umfatandi ábøtur gerast fyri at bøta um trygdina. Arbeiðið fer m.a. at bera í sær, at býráðið er noytt at steingja vegin í tvær vikur*